# Sjúrður Skaale eigur apuna

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Bæði landsstýrið og fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum snorksvóvu, tá lobbyarbeiðið um sonevnda hvalaveiðumálið skuldi gerast. Undirritaði purraði bæði fólkatingsmannin og landsstýrismannin í uttanlandsmálum út uttan úrslit. Nú er løgmaður vaknaður, og spurningurin er, um Sjúrður Skaale ætlar at sova víðari**

Málið um eitt stórhvalareservat sunnast á jarðarhálvuni, sum landsstýrið og danska stjórnin eru komin í klemmu av, er nú kastibløka millum ymsar partar í politiska umhvørvinum.

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Sjúrður Skaale, fær málið í lygnhálsin í bløðunum í gjár.

Tí nakrar linjur, ið vónandi kunnu vera við til at lýsa rætta samanheingin.

**Spurningurin um hvalareservatið**

Í stuttum snýr málið seg um, at nøkur limalond í Altjóða Hvalaveiðunevndini (IWC) vilja fremja eitt uppskot um at banna stórhvalaveiði á einum sjóøki í Suðuratlantshavi. Altso vilja nøkur skipa eitt stórhvalareservat.

Danska stjórnin er, sum flestu vita, samd við landsstýrunum í Føroyum og Grønlandi um, at burðardygg hvalaveiða eigur at verða loyvd.

Hesa prinsippstøðu hevur danska stjórnin framvegis, tó at hon stjórnin er vorðin noydd at broyta sína almennu støðu til spurningin um nevnda hvalareservat.

**Meirilutin í Fólkatinginum upployst**

Higartil hevur ein meiriluti í Fólkatinginum bakkað stjórnina – og bæði landsstýrini – upp um sjónarmiðið, at burðardygg hvalaveiða skal loyvast.

Seinnapartin týsdagin 10. juni kemur tó til sjóndar ein broyting á hesum øki. Hetta er dagin fyri, at umhvørvisnevndin í Fólkatinginum skal viðgera og taka støðu til spurningin um stórhvalareservatið.

Á Christiansborg nevnda dag er nógv virksemi í korridorunum. Fyrst frættist, at meirilutin er intaktur, hóast Socialistisk Folkeparti (SF) streingir á fyri at ávirka politikarar og flokkar øvugta vegin.

Seint seinnapartin og út á kvøldið koma onnur politisk tekin. Nú frættist, at ikki bert SF men eisini donsku javnaðarmenninir hava broytt støðu.

**Rossahandil um kúlubøkur**

Síðani kemur eisini fram, at annar ella báðir teir grønlendsku fólkatingslimirnir eru farnir í andstøðupartin í spurninginum um hvalareservatið.

Fleiri politikarar undrast á, at júst grønlendingar taka undir við spurninginum um at friða stórhval.

Í krókunum hoyrist, at ein rossahandil um stuðul í IWC til loyvi at veiða kúlubøkur fær annan grønlendingin at flyta seg í málinum.

Rossahandlar fáast tó sjáldan váttaðir.

**Lobby á Christiansborg**

Hetta týskvøldið 10. juni sær altso út til, at danska stjórnin, sum er ein minnilutastjórnin, er í vanda fyri at fáa ein meiriluta í Fólkatinginum ímóti sær. Tað tolir ongin donsk stjórn.

Tí byrjar nú eitt ávíst lobbyvirksemi á Christiansborg.

Undirritaði er við í hesum virksemi saman við stjórnarflokkunum. Endamálið er at vinna stjórnini meirilutan aftur, so uppskotið um hvalareservat ikki skal vinna frama á fundinum í umhvørvisnevndini dagin eftir.

**Útpurring til tjóðveldismenn**

Sama kvøld setur undirritaði seg í samband við Sjúrð Skaale. Tað tykist, sum hann ikki veruliga fatar, hvat fer fram í korridorunum á Christiansborg hetta kvøldið.

Vit báðir Sjúrður práta saman umvegis telefon, og undirritaði heitir á Sjúrð um at ávirka grønlendsku fólkatingslimirnar, sum jú eru við í Norðuratlantsbólkinum.

Eisini fær Sjúrður Skaale áheitan um at tala við samstarvsflokkarnar hjá Norðuratlantsbólkinum, sum jú eisini hava broytt meining í hesum máli.

**Ikki hond frá síðu**

Nakað seinni kemur Sjúrður Skaale á skrivstovuna hjá undirritaða.

Vit avráða m.a. at ringja til landsstýrismannin í uttanlandsmálum. Spurningurin er, hvat landsstýrið ger fyri at lobbya fyri føroyska sjónarmiðinum um stórhvalaveiði.

Svarið er negativt.

Uttanlandslandsstýrismaður in rættir ikki hond frá síðu.

**Rópa hart men gera onki**

Úrslitið er greitt dagin eftir, mikudagin 11. juni, í umhvørvisnevndini hjá Fólkatinginum.

Andstøðuflokkar, partur av Norðuratlantsbólkinum og samstarvsfelagar hjá Norðuratlantsbólkinum kroysta á hesum fundi stjórnina at taka undir við uppskotinum um hvalareservat í Suðuratlantshavinum.

Við øðrum orðum: Teir, sum her heima geyla harðast um, at stjórnin hevur broytt støðu, gjørdu eitt stað millum lítið og onki fyri at ávirka málið rætta vegin í Fólkatinginum.

Hetta er tað, vit plaga at rópa dupultmoralur.

**Hattin av fyri løgmanni**

Á tíðindafundi í sambandi við ríkisfundin mikudagin 25. juni greiddi Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, frá samanheinginum, ið eg havi lýst frammanfyri - nevniliga, at Norðuratlantsbólkurin eigur ein part av heiðurinum fyri, at málið gekk, sum tað gekk.

Her vísti løgmaður seg sum ein mann. Hann tók ein part av ábyrgdini av, at hann onki hevði gjørt fyri steðga, at danskir javnaðarmenn broyttu støðu til málið um stórhvalareservatið.

Nú reservatið aftan á seinasta IWC-fundin kortini ikki vísti seg at koma ígjøgnum í Altjóða Hvalaveiðunevndini, ætlar løgmaður at fara undir lobbyvirksemið mótvegis danska javnaðarflokkinum.

Betri seint enn ongantíð.

**Sjúrður pellar**

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum hevur ikki sama mansevni sum løgmaður.

Heldur enn at standa við, at hann sjálvur og landsstýrið snorksvóvu, tá arbeiðast skuldi, roynir maðurin av órøttum at flyta fokus við at skriva, at undirritaði hevur skyldina av, at Norðuratlantsbólkurin sveik, tá á stóð.

Slíkt eru menn.

**Avmarkaðan týdning**

Tað, eg havi sagt, og framvegis standi við, er hetta: málið um stórhvalareservatið á sunnari jarðarhálvu, sum nú kortini ikki er samtykt í Altjóða Hvalaveiðunevndini, hevur avmarkaðan týdning fyri Føroyar, og tíðin fer helst at vísa, at føroysku áhugamálini verða fullvæl vard, hóast ein meiriluti í Fólkatinginum tekur undir við uppskotinum um reservat.

Undirritaði hevur staðfest, at ein nýggj parlamentarisk støða er í Fólkatinginum, og so má arbeiðast út frá tí veruleikanum.

**Apuna eigur Sjúrður Skaale**

Spurningurin er nú, um Sjúrður Skaale og hansara felagar munnu vera vaknaðir, ella um teir ætla at sova víðari í Fólkatinginum.

Kanska velur Sjúrður at leggja seg aftur.

Í øllum førum eigur hann at taka politisku apuna við sær.

# Skunda sær spakuliga

KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður



Helena Dam á Neystabø fekk tapliga 180 milliónir játtaðar til strandferðslu. Hon fekk enntá tvær milliónir meira enn umbiðið. Henda risajáttan er til 'heila draslið' – skip, bilar, olju, umvæling, Svínoyarleið, Suðuroyarleið, ja enntá stjóraløn og starvsfólkaútferð. Men sum í sanginum um ta 'Skjønnu Helen' – ið var "oppdratt til rikdom og herlighet" – so skuldi alt vendast á høvdið í hesum máli. Nú skal serliga játtast til møttrikkar og búsningar á Smyrli, tí umsitingin hevur skundað sær spakuliga við einum breki, ið vísti seg longu í 2007.

**Skundskipan**

Vit hava rættiliga stranga stýrisskipan. Hon sigur greitt, at útreiðslur skulu játtast fyrst; síðani kann peningur brúkast. Hetta verður gjørt við landsins fíggjarætlan, ið kallast løgtingsfíggjarlóg.

Men tvinnanda mátar eru at fáa játtan umfram fíggjarlógina. Annar er at samtykkja eykajáttanarlóg á løgtingi; hin er at fáa góðkent fíggjarnevndarskjal. Hesin seinni møguleikin ber í sær, at landsstýrismaður í viðkomandi málsøki saman við landsstýrismanni í fíggjarmálum prógva málið hava skund og vera komið óvart á tey. Fíggjarnevndin viðger tá fyrst treytina um 'skund og óvart' – síðani kann nevndin viðgera málið og taka støðu til, hvørt hon vil játta ella ikki.

**Seinan skund**

Skjalið, ið vit fingu í málinum um Smyril var út av lagi vánaligt. Greitt var frá, at brekið fyrst var funnið í 2007 og endaliga staðfest í februar 2008. Undir vanligum umstøðum kann hending í februar júst vera dømi um nakað, ið kemur óvart á – tá er fíggjarárið jú byrjað. Er hendingin nóg stór og óvanlig, kann talan vera um at treytin í stýrisskipanini er hildin.

Men júst í fíggjarárinum 2008 var høvi at fáa alt við. Landið varð rikið eftir tí serliga slagnum av fíggjarlóg, ið kallast bráfeingis játtanarlóg. Tann endaliga fíggjarlógin var løgd fram, viðgjørd og samtykt í tíðarskeiðnum frá 22. apríl til 30. mai 2008. Viku seinni vildi Helena flyta finnurnar.

Sjálvur sat eg við greinini á fíggjarlógini, ið Helena varðar av. Á hesi grein var lagt upp fyri lønarhækkan, hækkandi oljuprísi og øðrum, ið væntandi var – men tikið var av upphæddini í mun til 2007 fyri útreiðslurnar av at senda Smyril í dokk; Smyril hevði verið í dokk í 2007 og væntaðist ikki í dokk aftur fyrr enn í 2009. Støðan er sostatt tann, at antin visti innlendis- og samferðslumálaráðharrin, at peningur manglaði, ella átti hon at vita tað.

Tá ið fíggjarnevndarskjalið endar við orðunum: "hetta mál hevur skund," er hetta tað, tey nevna "non sequitur" – láturliga høpisleyst framhald av tekstinum omanfyri. Onki av tí, ið sagt er í fíggjarnevndarskjalinum kann logiskt føra til niðurstøðuna, at málið eftir stýrisskipan okkara hevur skund og fíggjarnevndin tí hevur loyvi at viðgera tað.

**Vita og vilja**

Strandferðslan og landsstýrismaðurin í samferðslumálum hava skyldu at røkja skip og farleiðir innanfyri sína játtan. Strandferðslan hevur eina ta størstu játtan á fíggjarlógini; Strandferðslan hevur inntøkur fyri knappar hálvthundrað milliónir; Strandferðslan kann hækkað prísir, broyta ferðaætlan, bíða við hesum ella hasum og annars venda kappan eftir vindinum.

Um landsstýrismaðurin loyvir, at Smyril verður forsømdur innanfyri hesa risajáttan, kann talan verða um ákæru eftir lóg um ábyrgd landsstýrismanna. Stjórin tykist afturímóti dugnaligur og ágrýtin – og roynir sum frægast at verja stovn sín, nú Helena er farin í feriu og letur stjóran vera einsamallan á brúnni.

Men eitt segði hann, ið er ódámligt. Hann segði við útvarpið okkurt um, at hann 'ikki hevði skil fyri tí politiska.' At siga so er nakað sum at koyra bil og 'vita nakað um allar hasar drøyju víkiskyldurnar.' Allir góðir borgarar kenna stýrisskipan landsins, og ongin kann biðja lova sær at vera millum landsins umsitingarleiðara og ikki vera førur fyri at lesa tann tøkniliga sæð einfalda manualin, ið eitur "fíggjarmál landsins" og eru fimm stuttar paragraffir í stýrisskipanarlógini. Millum mest upplagdu tulkingarnar av stýrisskipanarlógini er, at løgtingsins fíggjarnevnd ikki skal verða betur kunnað av at lurta eftir útvarpstíðindum enn av at lesa fíggjarnevndarskjalið.

Ongin maskinmaður hevði viðgingið ikki at hava skil fyri dimensjónum og gevindum; ongin almennur stjóri eigur sjálvsikkur at siga seg ikki hava skil fyri stýrisskipan landsins.

**Om igen**

Í fíggjarnevndini er so, at trý av sjey skulu til at staðfesta, at talan ikki er um skundmál, ið vit kunnu avgreiða uttanum løgtingið. Tá ið vit tríggir í andstøðu (eisini sambandsmaðurin) høvdu staðfest júst tað sama, at treytin ikki nær námind var lokin, so legði samgongumeirilutin seg í lívd av okkum og 'hevði skund' at vísa skjalinum burtur.

Ongi tekin vóru um at samgongan var sannførd – og enn minni samd. Fíggjarnevndarskjalið tykist antin vera stemplað fyri frið skyld ella at vera ein roynd snildisliga at økja játtanina uttanum samlaðu raðfestingina í løgtinginum. Enn hevur ongin samgongupolitikari útlagað seg fyri hesi játtan – hetta er nú vorðið eitt løgið mál millum strandferðslustjóran og minnilutan í fíggjarnevndini.

Sjálvstýrisflokkurin strongdi á at raðfesta Suðuroynna undir fíggjarlógarviðgerðini. Vit løgdu dent á at framskunda eftirskúla í Hvalba, vit eru fyri vakstrarætlan, vóru vit at samtykkja økisdepilin fyri sinnisveik, fyri nýggjum námi í Prestfjalli, fyri bakkaverju í Sumba og Fámjin, og hava lagt stóran dent á at skúladepilin í Hovi eisini skal bjóða út annað enn miðnámsútbúgving, t.d. hægri útbúgving sum fjarlestur. Var sannførandi umbøn um økta játtan rættstundis fráboðað, so hevði ikki skortað vilji Sjálvstýris at raðfest Strandferðslu hægri og kanska okkurt annað lægri.

Tí dámar okkum sera illa at hesin bólturin aftur verður sendur innfyri til rangstaddan landsstýrismann. Hevur landið mist pengar ella mist høvi at umvæla Smyril, so verður ikki fíggjarnevndin ábyrgdað. Ongin konto á fíggjarlógini eitur "Smyrlafinnur" líka so lítið sum "síðsti túrur hjá Másanum" ella "bilur og ein um Suðuroyarfjørð" ella "økt sigling um Skopunarfjørð" eru konti á fíggjarlógini.

Ábyrgd er landsstýrismanna.